LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.
tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

TOYOTA CARINA
við skaða til sølu sum eykalutir. Góð dekk, radio v.m. Til sølu fyri uml. 3.500 kr.
Tlf. 448861 ella 211949

HONDA CIVIC
Árg. 86, koyrt 193.000 km, koyrir væl, nýsýnaður, nýtt útstoyt, nýggj dekk og gott Sony anlegg fylgir við.
Tlf. 211254

TIL SØLU
Renault 19 GTS, árg. 92, 170.000 km, sera økonomiskur, í góðum standi, til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 316166

TIL SØLU
Ford Escort XR3i til sølu sum hann er fyri 6.000 kr. Spoylarasett, nýggj kobling og aðrir nýggir eykalutir fylgja við.
Tlf. 519689, e. kl. 17.00

TOYOTA PICNIC 2.0
Toyota Picnic 2.0, 7 pers., bensin, árg. 09/2000, koyrt 90.000 km., automatisk gear, ABS bremsur, dupult airbag, servostýring, tráðleyst centrallás, el-spegl við varma, el-rútar framman og aftan, tónaðar rútar aftan, el-instilling av forlyktum, tokulyktir framman og aftan, varma í forsetrunum. CD-radio, alu-felgur, pikadekk á felgum, hand free telefon, takboks fylgir við, service bók fylgir við. Ein eigara, er í sera góðum standi. Skal roynast. Prísuppskot: 180.000,-. Ring og fá meir at vita. Helst eftir kl. 16.00
Tlf. 214450 ella 314450

4 VETRARDEKK
á 15" sportsfelgum, passa til Volvo S40, koyrt ein vetur,185/65r15 Pcd:4x114,3, til sølu fyri 3000 kr.
Tlf. 210809

OPEL ZAFIRA
diesel, 5 ára gamal (nov. 1999). Kann hava 2 – 7 setur. Hevur koyrt 115.000 km. Gev eitt boð.
Tlf. 441539

CITROËN BX 1.6 GTi
frá 1992, til sølu fyri kr. 6.000. Sýnaður mars 2004. Bilurin hevur alufelgur við góðum Michelin summardekkum á. Ring
tlf. 217204

VW PASSAT
Nýsýnaður, 1800 motor, í sera góðum standi, brennir lítið, hevur tvey sett av dekkum á sportsfelgum, til sølu fyri 10.000 kr.
Tlf. 273097

MAZDA 626 GE 2:0
árg. 92, nýsýnaður, til sølu.
Tlf. 264146 - 443334

VW TRANSPORTER
Turbo diesel, árg. 87, til sølu. Gev eitt boð!
Tlf. 503797

Til sølu
Ein svartur Volvo 740 gl í góðum standi, nýsýnaður, er til sølu, um hóskandi boð fæst.
584444

FELGUR
Org. Honda lætt metal, 15'', kr. 2.600 og 4 summardekk á felgum. Nýggj. Stødd 155/80 R13 kr. 1.200.
Tlf. 317024 ella 221379

MERCEDES 280 SE
Árg. 77 við eyka motori og dekk á felgum til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 421093 ella 211834

TIL SØLU
Lítið brúkt pikadekk á felgum. Passa til Peugeot.
Tlf. 220520

TIL SØLU
16'' alufelgur. Passa til Peugeot og einar 15'' alu.
Tlf. 220520

HYUNDAI ELANTRA 1.5 GLI
Árg. 92. Nýsýnaður við radio, cd-spælara/box, 20.000 kr.
Tlf. 224910

PEUGEOT 206 1.4
Árg. 2000, svartur, 3 hurðar, og hevur koyrt 94.000 km. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 722700 ella 580940

4 VETRARDEKK TIL SØLU
Hankook lameldekk 195-65 R15, hava koyrt 800 km. Sum nýggj til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 281035

TIL SØLU
4 felgur 15
5 boltar til ein Daewoo Leganza. Prísur 150 kr. pr. stk."

TIL SØLU
4 pikadekk 185/70-14. Sera lítið brúkt við felgum passa til Daewoo Nubira. Prísur einans 2.000 kr
Tlf. 315741

TIL SØLU
Opel Astra 1.5 GL, árg. 94, koyrt 132.000 km. 25.000 kr.
Tlf. 508396

TIL SØLU
Ein BMW 325i frá 96 til sølu
Tlf. 227434

NISSAN SUNNY 1.6
Árg. 87 til sølu. Hevur defektan gearkassa, nýtt útstoyt, nýggj summardekk og pikadekk, spoylarar og aðrar eykalutir, bert 7.000 kr. Vinarliga ring
Tlf. 254894

4 HEILÁRSDEKK VIÐ PÍKUM Á FELGUM
á felgum. Stødd 175/70-14, lítið brúkt til sølu fyri 3.500 kr.
Tlf. 447948 ella 217948

OPEL ASTRA F 1.6 CLUB
Svartur/metallakk, árg. 98, í perfektum standi, við króki, takboylum og pikadekkum á felgum, verður seldur fyri 55.000 kr. Ring
Tlf. 747870

TIL SØLU
1 1/2 ára gamal Ford Focus, stationcar, 1.6 motor, 110 HK, jubileumsmodell, el-rútar, hita í setrum, CD-spælara, hydrauliskar stabilisatorar, liggur væl á vegnum. Koyrt 20.000 km. Selist fyri 150.000 ella boð yvir. Nývirði í 2004 214.000 kr. E-mail: ts@kallnet ella
Tlf. 522555

TOYOTA JEEPUR
til sølu. Landcruisari. Prísuppskot kr. 120.000. Árg.1994. km 195.000. Sær sera væl út.
Tlf. 212662

TOYOTA COROLLA
sum eykalutir. Hevur nýggj pikadekk 13'' og radio fylgir við. Til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 317414 ella 226315

EIN FORD ESCORT
Til sølu sum eykalutir.
Tlf. 310352

TIL TOYOTA HAICE
Árg. 89. 4 felgur við dekkum, Michelin, 15''.
Tlf. 210560

DEILIR TIL TOYOTA LITACE
Model CM 35. 4 felgur við dekkum 1.500 kr. 4 pikadekk 185x65 R 14, prísur 900. Startari, dynamo, akkumolatorur, forkúf,, 300 kr. stk. Lyktir framman og aftan, 100 kr.
Tlf. 210560

FORD FIESTA DIESEL
Árg. 95, koyrt 176.000 km., í góðum standi, nýggj dekk, nýtt útstoyt, nýggja kamreim, sera økonomiskur, til sølu fyri rímiligan prís.
Tlf. 265343

SAAB 9000
2 Saab 9000 til sølu sum eykalutir. Kr. 3.000.
Tlf. 320566 ella 226485

TIL SØLU
4 15" Ford alu. felgur krom look við nýggjum Toyo summardekkum 195/50-15". Prísur 3.000,- kr. Áhugað kunnu ringja á
tlf. 259335

HEILÁRSDEKK
2 Dayton 185/70-14". 2 Debica 185/70-14". Lítið brúkt, prísur 1.500,- kr. Áhugað kunnu ringja á
tlf. 259335 (Tórshavn)

MAZDA 323 1.3
Bensín, árg. 1976. Selist reservalutir. Góð dekk, nýggjar stoytdoyvarar aftan.
Tlf. 756040

TIL SØLU
Scania 113, árg. 93. 6x2 við skiftilast og pláss til krana. Scania 113, árg. 8x4.
Tlf. 217203 ella 371203

TIL SØLU
18" Aez Olymp sportfelgur 5x100 til sølu fyri 7.000 kr uttan dekk ella 12.500 við spildurnýggjum dekkum. Nýprísur 27.600 kr.
Tlf. 322110, 214487 ella Fax 322111

BÍLIGA TIL SØLU
Peugeot 306, árg. 96 og koyrt 92.000 km, 15" alufelgur, vetrardekk fylgja eisini við. Sær sera væl út.
Tlf. 332303/221221

VOLVO 740 TI
182 HK, árg. 88, 190.000 km, nýsýnaður, leður/velour innan, koksgráur, nýggj dekk, til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 212101

TIL SØLU
Volvo 240 stationcar. Árg. 1986. Nógvir nýggir eykalutir ísettir.
Tlf. 210919

BMW TIL SØLU
BMW 324 2.4 TD, V6 við motorskaða til sølu til hægstbjóðandi. Spildur nýggjar sportfelgur v/ dekkum kunnu fylgja við, sera bíliga.
Tlf. 581515

BILUR VIÐ SKAÐA
Saab 9-5 við skaða árg. 98 bíliga til sølu vegna flyting.
Tlf. 580474

SUZUKI SVIFT 1.3
Árg. 90 til sølu fyri 1.6000 kr.
Tlf. 218778

Amboð

VARIANT VIÐFESTISVOGNAR
til sølu, fleiri model á goymslu.
Kaj Andreasen & Co, tlf. 315600

AMBOÐ
Amboð til maskinverkstað til sølu. Ring
Tlf. 313484 ella 219584

Arbeiði

UNGUR 16 ÁRA GAMAL
drongur við koyrikorti til prutl, søkir alt arbeiði eftir skólatíð.
Tlf. 507102, Pætur

ARBEIÐI SØKIST
24 ára gamal drongur søkir arbeiði. Havi koyrikort vil vanl. bil og til trukk, annars nógvar arbeiðsroyndir. Hevur nakar brúk fyri mær. Ring
Tlf. 509309 ella 317109

EG ÁTAKI MÆR VASKIARBEIÐI
Heima hjá tær, um tú hevur brúk fyri tí. Vinarliga ring
Tlf. 223339 Kristina

MVG-BÓKHALD
Tørvar tær hjálp við MVG-uppgerðini ella bókhaldinum, so eri eg til reiðar at gera tað.
Tlf. 265573

ALT MÁLARAARBEIÐI
verður gjort. Ring og fá tilboð.
Tlf. 250387

ANNARLEIÐIS SMÁKØKUR
ella lagkøkur til føðingardagin, veitsluna, móttøkuna ella okkurt heilt annað? Eg baki bingokúlusmákøkur/lagkøkur, marskøku, ymiskar marengsbotnar og mangt annað. Eg baki – tú heintar. Ring millum kl. 14–18
Tlf. 273592 í Havn

FLOTTAN BIL
Eg ætaki mær at polera, bona og reinsa bil innan, sum uttan
Tlf. 256495

Barnaansing

DAGRØKT TIL 1 ÁRA
gamlan drong søkist skjótast gjørligt í Tórshavnar kommunu ella nærhendis.
Tlf. 421803

Barnaútgerð

TIL SØLU
Barnasong við trappu, skrivaraborði og madrassu, 190x70, í góðum standi, til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 448166

PEREGO KLAPPSTÓLUR
úr aluminium, til sølu.
Tlf. 312190

YMISKT TIL SØLU
Skrástólur (lux), 250 kr. Vøgga, 250 kr. Beristativ (rygg). 250 kr.
Tlf. 583004

SIMO KOYRISTÓLUR
til sølu fyri 2.500 kr. Bleyt lift, net, regnslag, beriseli, seli, skiftitaska og systkinasetur fylgja við.
Tlf. 583004

TIL SØLU
Altanvognur, Silver Cross v/stálkassa 1.200 kr. Koyristólur við lufthjólum. So gott sum óbrúktur 2.800 kr. Bilstólur, Britax 0-6 mán. Eisini sum nýggjur 300 kr.
Tlf. 333933 ella 533933

TIL SØLU
Fisher Price mobile stjernehimmel m. musik og lyser op i loftet 300,- kr
Tlf. 322120 ella 522120

TIL SØLU
Skrástol / babysitter 200,- kr.
Tlf. 322120 ella 522120

MYRKABLÁUR STÓLUR
v/ heitum posa, fluguneti og regnslagi til sølu fyri 2.000 kr. Er brúktur nakrar fáar ferðir. Nýprísur 4.900 kr.
Tlf. 448595 ella 263401

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Ein svartur barnavognur í leðurlook av slagnum Hartan er til sølu. Vognurin 15 mór gamal og bert brúktur til eitt barn. Eisini fylgir ein lyft av sama slag við. Nýprísur kr. 6000,-. Verður seldur fyri kr. 3000. Ring
Tlf. 504020

BABYLIFT TIL SØLU
Ein myrkablá babylift av slagnum Simo er til sølu. Liftin er ógvuliga solid og er 90 cm til longdar. Madrassa og babydýna fylgja við. Prísur 500. Ring
Tlf. 504020

Bátaútgerð

MYRA 27 FÓT
Við fiskiloyvi. Væl útgjørdur, bíliga til sølu.
Tlf. 452133

NÝGGJ KLAKSVÍKSEGNINGARTRAKT
Og nakað av línuútgerð til sølu.
Tlf. 213909

Bingo

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu mánakvøldið 18. oktober, kl. 19.00. Nógvir góðir vinningar.
Astma- og Allergifelagið

SANDAVÁGS ÍTRÓTTARFELAG
skipar fyri góðum eydnuhjóli í SÍF húsinum sunnudagin 24. oktober 2004. Byrjað verður klokkan 17.00. Tey, sum vilja stuðla við lutum, kunnu lata teir til onkran av nevndalimunum.
SÍF

SUÐUROYINGAR!
Gott bingo verður í Framtíðini onskvøldið 10. nov. kl. 19.30. Annaðhvørt bingo føroysk gás. Á lutaseðli m.a. olja fyri 1.000 kr., lamb, gæs og dunnur.
Vágs Kappróðrarfelag

GOTT BINGO
verður sunnudagin 7. nov. kl. 16.00 í Framtíðini. Høvuðsvinningur á lutaseðli er ein Apex ferðaseðil frá Atlantsflog.
Vágs Svimjifelag

BINGO
Verður í Felagslonini í Fuglafirði leygardagin 16. okt. kl. 16. Á lutaseðli: Ísl. lambskrov. Nýkomið.
Eldrafelagið Borgin

GOTT BINGO
Verður í Billiardhúsinum onskvøldið 20. okt. kl. 19.30.
Vágs Billiard- og Bridgefelag

FRÁ STRÁLUNI
Gott bingi verður á Strondum sunnudagin 17. okt. kl. 16. Burturlutað verður m.a. 2 føroysk krov, gávukort á 1.000 kr. og ein Apex-ferðaseðil við Mærsk til Danmarkar, sum skal brúkast í hesum mánaðinum. Eisini verða lúkur at lata upp.
Strálan

BINGO
Verður í Pálstovu sunnudagin 17. okt. kl. 16. Full pláta 500 kr. Á lutaseðli 15 vinningar, m.a. 3 røst før. krov í heyst. Bingola, eyka spæl.
Kiwanisfelagið Rósan

FRÁ TÓSHØLL
Gott bingo verður í Tórshøll leygardagin 16. okt. kl. 20. Høvuðsvinningur á lutaseðli er ræst krov og gávukort. Eisini er eykaspæl. Øll vælkomin.
Tórshøll

EYDNUHJÓL VERÐUR Í STØKKHØLLINI
Í Saltangará 31. okt. 2004. Tey, ið vilja stuðla við at lata lutir til eydnuhjólið kunnu ringja til Poulu, tlf. 447073, Amy, tlf. 447718 ella Miu, tlf. 447242. Takk fyri stuðulin.
Eldrafelagið Nón í Saltangará

GOTT BINGO
verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 18. oktober kl 19. 12 plátur 100 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli eitt føroyskt krov. Drigið verður millum spelini. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Bøkur

BØKUR
The Zoology of the Faroes, 1928-1971 øll útgávan, (6 heftar bøkur í alt), til sølu, um hóskandi boð fæst.
Tlf. 333582 ella 213582

Burturm. /funnið

LYKLAR BURTURMISTUR
sunnukvøldið 3. okt. millum kl. 23.00–01.30. Uml. 7 lyklar í einum bundi. Finningarløn verður latin.
Tlf. 315301

EITT MYRKABLÁTT TELT
er funnið. Er formað sum ein Igloo. Fæst við at avheinta tað.
Tlf. 316125

LYKLATYSSI BURTURMIST
Í miðbýnum í Havn. 3 lyktar eru í, ein hevur svart plast á. Finningarløn verður latin. Ring
Tlf. 270074

FUNNIÐ UR
Eitt mannfólkaur er funnið í Krókabrekku í Havn umleið 1. oktober.
Ringið 312986

BRILLUR BURTURMISTAR
í Vági. Um onkur hevur funnið tær, vinarliga ring
tlf. 373492

Býli

HÚS Í MIÐBÝNUM TIL LEIGU
frá 1. nov. Stødd: uml. 100 fermetrar. Miðhædd, loft, lítið kjallararúm. Loft: 2 kømur, wc/bað, stór gongd. Miðhædd: Durur, gongd, køkur, kamar, stór stova. Kostnaður um mánaðin 6.000 kr. v/ hita, u/ ljós. 1 mór. depositum krevst. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn,
Bill. mrk. 240

ELDRI HÚS Í SKOPUN
til sølu.
Tlf. 258764

ÍBÚÐ/HÚS YNSKIST TIL LEIGU
Vit eru tveir trúgvandi menn, sum ynskja at leiga eina íbúð/hús í miðstaðarøkinum frá 1. jan. Roykja og drekka ikki.
Tlf. 212739, kl. 12–18.00

ÍBÚÐ SØKIST
Par í 40-unum søkir eftir íbúð í Havn ella nærhendis skjótast gjørligt. Hava fast arbeiði. Kostnaður max. 4.000 kr. u/ ljós og hita.
Tlf. 504848 ella 256039

TIL LEIGU
46 fermetrar stór íbúð í Hoyvík til leigu. Skriva til Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn
Bill. mrk. 1938m

ÍBÚÐ YNSKIST
Íbúð ynskist til leigu í høvuðsstaðarøkinum. Ring
TLF: 283322 ella 212995

HÚS TIL LEIGU
Hús í Havn við 500 fermetra grundøki til leigu frá 1. november. Gott úsýni. Leiga: 5000,- kr. um mánaðin + nýtslu. Ring til
Tlf. +45 28919403

VIT ERU TRÍGGJAR
Ið skula niður til KBH í lestrarørindum 21.11–04.12. og vit mangla eitt stað at búgva. Er tað nakar, ið hevur eina íbúð at leiga okkum hetta tíðarskeiði. Vit krevja ikki nógv. e-mail thora_a@hotmail.com ella ring ella sms
Tlf. 269196

HÚS TIL SØLU
Á Tvorábakka
Tlf. 371313 ella 213713

HÚS TIL SØLU
Eldri hús, sum eru nýrenoveraði, eisini eru tilbygningar gjørdir. Eru sera hugnalig og í fínasta standi. Húsini liggja í hjartanum í miðbýnum. Boð undir 1.550.000 kr. ongan áhuga. Skrivi til Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn
Bill. mrk. 1938k

GISTING Í RUNAVÍK
Hevur tú brúk fyri at gista eina ella fleiri nætur í Eysturoynni, so havi eg eina góða íbúð at leiga tær. Íbúðin er 50 fermetrar við øllum hentleikum, og liggur í hugnaligum umhvørvi úti við Toftavatn.
Tlf. 447451 ella 747451

TIL LEIGU
Kamar til leigu á Argjum til ikki roykjara. Atgongd til baðiverilsi, køk og stovu. Kr. 2.000 um mór. Skriva til:
babyjan2004@yahoo.dk

HÚS TIL SØLU
Eini eldri sethús á Norskála verða lýst til sølu. Húsini eru 50 fermetrar til stoddar.
Tlf. 316639 ella 254025

YNSKIST TIL LEIGU
Hóskandi íbúð/hús ynskist til leigu í miðstaðarøkinum helst á Argjum til familju við tveimum børnum
Tlf. heima 322325 fartlf. 548020

HÚS TIL LEIGU Í 4 MÀNAÐAR
Hugnalig hús í Eysturbýnum til leigu frá 15. nov. 2004 til 15. mars 2005. Húsini verða leiga út við innbúgvi. Leiga 5000 kr. um mán. + ljós og hita. 1 mán. depositum krevst.
Ring 315490 ella 215490

ÍBÚÐ ELLA KAMAR Í KBH
Eg eri lesandi, ið skal í praktik í Keypmannahavn í januar mánaði, og eg leiti tí eftir íbúð ella kamari hetta tíðarskeiðið (helst á Oyrasundskollegiinum). Um tú hevur nakað, ella veitst um nakað, vinarliga ring ella skriva.
Tlf. 558889

ÍBÚÐ YNSKIST
sum skjótast í Tórshavn ella nærhendis.
Tlf. 258821

HÚS Í KVÍVÍK TIL LEIGU
Fult møbilerað hús í Kvívík til leigu frá 1. novembur og fyribils fram til 1. mai 2005. Húsini er stór 270 fermetrar og alt er innrættað.
Tlf . 421402 aftaná kl. 18.00

2 KØMUR TIL LEIGU
kr. 1.500,- fyri hvørt í vesturbýnum, atgongd til køk, bað og vaskimaskinu, 1 mór. depositum.
Tlf. 314757 eftir kl. 17

SUMMARHÚS VIÐ GJÓGV
til leigu. Allir vanligir hentleikar eru í húsinum, møguleiki er eisini at leiga húsini í stytri tíðarskeið.
Tlf. 421305 ella 210305

HJÁLP!!!
Ungt par leitar eftir íbúð ella lítlum húsum í Runavíkar økinum. Kunnu tit hjálpa okkum so ringi á
Tlf. 218043 ella 257707 eftir kl. 18

BUTIKSLOKALE
ønskes til leje í Vág. Er der nogle der har et lokale til leje í Vág. Med evt. forkøbsret min. leje 3-4 ár. Der skal være toilet og evt. lille køkken eller mulighed for det. Så kontakt os straks og vi kan aftale nærmere.
Ivan og Anita Poulsen, tlf. 373118, Vág

UNGT PAR
við einum barni ynskja íbúð í Tórshavn skjótast gjørligt. e-mail: bhe@post.olivant.fo
Tlf. 224385/253382

ÍBÚÐ YNSKIST!
Mamma við tveimum børnum ynskir íbúð við 2 kømurum í Havn skjótast gjørligt. Max 4.500 kr. við ljós og hita. Fara væl um og gjalda rættstundis.
Tlf. 223339, Kristina

TIL LEIGU
2 kømur til leigu í Vesturbýnum við atgongd til køk, bað og vaksimaskinu, nær við Læraraskúlan.
Tlf. 221158 ella 313799

HÚS TIL LEIGU Í MIÐBÝNUM
Stór hús til leigu í miðbýnum í Havn. Kostnaður er 7.500 kr. um mán. 3 mán. depositum krevst. Áhugað kunnu ringja
Tlf. +45033930330 MJ

PAR SØKIR ÍBÚÐ
Fitt og friðarligt par søkir íbúð í Havn. Hava fast arbeiði, gjalda til tíðina, fara væl um og roykja ikki. Max 4.000 kr. um mór. Vinarliga ring
tlf. 220819

HØLI TIL LEIGU
Í miðbýnum. Uml. 200 fermetrar.
Tlf. 315438

Dansur

VEITSLA FYRI STØK
Aldur: umleið 40 ár og eldri. Nær: 30. oktober kl. 19.30.. Hvar: Í Pálsstovu, Mykinesgøta 7, Tórshavn.Matur , dogurði og tónleikur X/Rays. At tekna seg: Flyta kr. 350,- í Suðuroyar Sparikassa k. nr. 407.410.7. Kvittanin er atgongunerki. Skal viðmerkjast: Navn, búðstaður og telefonnummar. Seinasta freist: hósdagin 21. oktober. Tey fyrstu 150 eru tryggjað pláss.. Nakað at spyrja um, so ring til:
Dagbjørg tlf. 582400 Ólavur tlf. 220589, eftir kl

Dýr

FITTUR REYÐUR KETTLINGUR
(Fressur), verður latin djóravini. Ring
Tlf. 322234

DVØRGHAMSTRARAR
4 sera fittir dvørghamstrarar til sølu fyri 70 kr. stk. Vinarliga ring
Tlf. 322205 ella 522205

KETTLINGAR
2 sera fittir kettlingar verða latnir djóravini. Eru reinligir.
Tlf. 255279

HEY
Vit eru 3 fittir kettlingar, ið leita eftir einum góðum heimi. 2 eru svartir (1 ketta og 1 frensur) og ein er gráur (frensur).
Tlf. 217459

KANINUNGAR
(dværgvæddere) til sølu fyri kr. 200 stykkið. Kunnu latast djóravinum vikuskiftið 16.–17. oktober. P.S. Kaninungarnir eru havnarmenn! Ringi á
Tlf. 514808.

FITTUR REINLIGUR KETTLINGUR
Kann latast djóravini.
Tlf. 373346

ROSS TIL SØLU
Barnavinarlig ryssa til sølu. Vælegnað til nýbyrjarar. Útgerð kann fylgja við.
Tlf. 424795

DALMATINARI TIL SØLU
Ektaður dalmatinari uttan stamtalvu, við øllum vaccinationum til sølu. Fyllur 1 ár 4. nov. Øll djóralæknappapír, kurv og reimar fylgja við. Bert 1.500 kr + frakt. Kann møguliga koma við til FR 25. oktober.
Tlf. +45 64821363 ella +45 40966956 Fía

WEST HIGHLAND TERRIER
Rasuhundur av lítlum slag, vælegnaður til tað føroyska veðurlagið. Hvølpurin er í Fuglafirði. Hvølpurin er ein hannur. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 444023

HEY
Vit eru 5 hundahvølpar sum mangla eitt heim, vit eru 6 vikur gamlir. Vinarliga ring
tlf. 507138 ella 448475

HUNDAHVØLPAR
Verðins fittastu hundahvølpar verða latnir um ca. 3 vikur. Eru heilt ljósir. Mamman er miðal stødd.
tlf. 316312

Fundir

PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN
Ársaðalfundur felagsins verður í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøldið 20. oktober kl. 19.00.
Nevndin

Húsarhaldstól

HUSQVARNA
model nr. 431954, fót og el-drivin seymimaskina í borði til sølu fyri hægsta boð. Er áhugi, ring
Tlf. 224589 ella 441395

BORÐOVNUR
Stórur borðovnur v/grill til sølu fyri 300 kr. Nýprísur 899 kr. Ring
tlf. 504927

TIL SØLU
»Siemens« komfýrur v/ bakarovni, keramikkplátu, vælhildin fyri 2.000 kr.
Tlf. 508338 ella 227351

TIL SØLU
Køliskáp »Atlas«, 100x55 cm, sum nýtt, fyri 2.000 kr. Ring
Tlf. 508338 ella 227351

TIL SØLU
»Siemens« eymhetta v/ útsúgving, fyri 500 kr.
Tlf. 508338 ella 227351

TIL SØLU
Grønt baðikar v/ 2 síðum, 150 cm, fyri 500 kr. Ring
Tlf. 508338 ella 227351

TIL SØLU
Grønt vask, stórt til baðirúmsborð, vælhildið fyri 500 kr.
Tlf. 508338 ella 227351

TIL FELØG, BYGDAHÚS O.O.
Steikifot, eplafot, sósaskálir, ymiskt bestikk, termokannur o.a. bíliga til sølu
Tlf. 373169 ella 373313

BREYÐSKERARI
Rádvad sum nýggjur 250 kr. Ring
Tlf. 373169 ella 373313

TIL SØLU
Uppvaskimaskina Elektrolux, brúkt, í góðum standi, fyri 2.000 kr. Ring
Tlf. 508338 ella 227351

Innbúgv

TIL SØLU
Nýtt borð + 4 stólar til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 310009, eftir kl. 17.00

REOLVEGGUR
úr lakeraðari bók, 4 sektiónir, 2 m langur, til sølu.
Tlf. 447061

SKENKUR
Ljósur skenkur við yvirskápum til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 310009, e. kl. 17.00

PALISANDER REOL
í trimum sektiónum, til sølu.
Tlf. 312190

GARDINUR
Vælhildnar, brúktar gardinur, mynstrut ráhvítt tilfar, 6 stk. á 230x230 cm. Hvørt stk. er tvær samanseymaðar longdir. Prísuppskot 250 kr. pr. stk.
Tlf. 311943

GER KVETTIÐ
Hege reol, sum nýggj, hvít beisað, LXH = 120x107 cm. (Keypt í Skemmuni), til sølu fyri 800 kr. Nýprísur 1.295 kr.
Tlf. 311943

TVÆR FUTON SOFUR
til sølu. Onnur svørt við gráum stelli, útlsligin 120 cm, 900 kr. Hin myrkagrøn við svørtum stelli, útsligin 120 cm, 600 kr. Báðar eru frá Ide-møblum.
Tlf.nr. 313372

SOFASETT
2 + 3 persóna, bíliga til sølu.
Tlf. 444644, eftir kl. 15.00

TIL SØLU
Tvær sofur, 180 og 140 cm breiðar, tvey sofaborð, 65x65 og 130x70, alt sær út sum nýtt og er í góðum standi, til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 375290, e. kl. 19.00

KOYGGJUSONG ÚR TIMBRI
til sølu uttan madrassur. Útv. mát 77x198x130. Prísur 400 kr.
Tlf. 313092 ella 503029

TIL SØLU
Eitt nýtt telduborð
Tlf. 256695

EIN DUPULT SONG
við ljósi uppi yvir, sum nýggj, bíliga til sølu.
Tlf. 256695

MADRASSA
Lítið brúkt madrassa 140x200, bara 1 ár, fyrr prísur 4.199 kr. Nú 2.000 kr.
Tlf. 221849

TIL SØLU
Gulv up-light (standerlampe) m. læselampe 300,- kr. Ta' begge for 450,- kr.
Tlf. 322120 ella 522120

TIL SØLU
Computerbord (skemman) til salg 200,- kr.
Tlf. 322120 ella 522120

TIL SØLU
4 køksskáp fyri 500 kr. Ring
Tlf. 508338 ella 227351

BÍLIGA TIL SØLU
Reolir, lenistólar, einkult song, springmadrassur, 2 skenkar, telduborð og sjónvarpsborð.
Tlf. 513293

TEKNIBORÐ
Lítið brúkt tekniborð við teknimaskinu til sølu fyri 6.000 kr. Ring
Tlf. 318970

BOXMADRASSUR
2 boxmadrassur, hvør 90x200 til sølu fyri 500 kr. hvør. Ring
Tlf. 318970

ANTIK MØBLAR
Spisiborð og 6 stólar, stórt skáp & bufet, nógv útskorið og snar. Lakk eik. Hoyr nærri á
Tlf. 573999

RUGGUSTÓLUR
Gamal ruggustólur (sýrað eik) í góðum standi til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 573999

HYGG HER
Hornasofa, stovuborð og reolsystem, alt sera bílig, til sølu vegna flyting. Frá 3 til 11 mán. gamalt.
Tlf. 261595 eftir kl 18

TIL SØLU
2 mans sofa 71x123, ikki leður, til sølu fyri 300 kr
Tlf. 271723

ROSENBORG KAFFISTELL
+ diverse dele sælges samlet. Stor olielampe - lysekrone, to 5 armede ny-forsølvede lysestager fra 1920, gammel spændende telefon. Ring efter kl. 18.30.
Tlf. 228600

TIL SØLU
Box song 140x200, borð 88x150 og 4 stólar.
Tlf. 314203

SONG TIL SØLU
Song, 140x200, við madrassu til sølu vegna plásstrot. Prísur 900 kr.
Tlf. 503983

SKRIVARABORÐ
80 x 160 stórt, eitt ára gamalt, til sølu fyri 700 kr.
Tlf. 214100

Leikur

RC-MODELFLÚGVARI
Klárur at flúgva. Skrokkurin er í hampiligum standi, við fjarstýring. 4.000 kr.
Tlf. 250621

2 PØR AV RULLISKOYTUM
og fleiri spøl til Playstation. Einki brúkt
Tlf. 256695

MONSTER TRUCK TIL SØLU
Impuls xxl til sølu fyri 3200 kr. prísurin kann diskuterast øll útgerð fylgir við, 3,5 cc OS. motorur.Nývirði uml. 6200 kr. Ring og hoyr nærri,
Tlf 265028

GAMEBOY ADVANCE
v/3 spølum til sølu fyri 700 kr, lítið brúkt.
Tlf. 265343

BRATZ
4 Bratz dukkur + 1 Bratz-bilur til sølu (lítið brúkt)
Tlf. 421789

LEIKUR TIL SØLU
Posar við ymiskum leikum til sølu fyri 20,- kr. og 40,- kr.
tlf. 583388

Lutaseðlar

LIONS CLUB EYSTUROY
Nipanfyri standandi vinningar eru ikki enn avheintaðir. Nr. 1550 Noregsferð við Smyrli. Nr. 2573 lamb. Vinnarnir biðjast siga frá skjótast gjørligt og í seinasta lagi 22. okt. 2004 á tlf. 443003.
Lions Club Eysturoy

Matur

ØÐUR
25 kg – minimum 10 kg. Feskar, verða tiknar so hvørt sum bílagt verður.
Tlf. 510405

KJØT
Krov, avroð, v.m. kunnu bílleggjast nú! Ringið
Tlf. 328089 Kirkjubøargarður

SUÐUROYINGAR
Krov og livandi seyður til sølu
Tlf. 507140

TIL SØLU
3 lambsær til sølu, at slakta.
Tlf. 218551

Pløgg

TIL SØLU
Graviditets cowboybukser (NY) 400,- kr.
Tlf. 322120 ella 522120

TIL SØLU
Konfirmatiónsskógvar, nr. 40, til sølu fyri 1/2 pris 125 kr. Bert brúktur eina ferð. Ring
Tlf. 271963

SKÓTABÚNI
Brúktur skótabúni, stødd 12 ár, ynskist til keyps.
Tlf. 448608

TIL SØLU
Tveir nýggjir heimabundnir dópskjólar til sølu. Fóður, dreingjakollur og gentukýsi fylgja við. Um hetta hevur áhuga. Ring
Tlf. 373308, 317107 ella 220329

Samband

EIN FRÁSKILDUR MAÐUR
40 ára gamal, fráskildur, eðriligur maður, ynskir at koma í samband við kvinnu um sama aldur. Børn ongin forðing. Eg havi sjálvur børn. Búgvi í Tórshavnar kommunu. 100% tagnarskylda verður givin. Mynd ynskist. Skrivi til Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn
Bill. mrk. 1936cc

Sjavs

ALMENN SJAVSKAPPING
verður á Kafe Blákross týsdagin 19. oktober kl. 19.00.
Kafe Blákross

Súkklur

SÚKKLUR TIL SØLU
Gentusúkkla til 7-8 ár, fyri 400 kr., og dreingjasúkkla til 4 ár til sølu fyri 200 kr.
Tlf. 310009, e. kl. 17.00

TIL SØLU
Ein Winther Dolphin súkklu- og gonguvognur til sølu. Pláss til tvey børn, vatn og vindtættur.
Tlf. 312190

TIL SØLU
Aprilia RX 50 frá aug. 2002 til sølu. Originalt útstoyt fylgir við. Í góðum standi. Vælhildin.
Tlf. 509383

TIL SØLU
Ein d